HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Eftirlitsfólk

Eitt starv sum eftirlitsfólk á Fiska- og djórasjúkudeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er leyst at søkja.

Fyri rætta umsøkjaran, kann tað eisini koma uppá tal, at tú fær uppgávur sum góðskuleiðari fyri okkara kanningarstovum, serliga við atliti til okkara akkreditering, sí www.danak.dk, akkr. nr. 303.

**Starvið fevnir um:**
- Eftirlit sambært galdandi lóggávu innan djórasjúkuøkið, við serligum atliti at alivinnuni sum heild
- Eftirlitsarbeiðið kemur serliga at fevna um eftirlit við sóttreinsing av frárenslvatni frá
  o sláturvirkjum
  o brunnbátum
  o flutningi av alifiski og
- Málsviðgerð í sambandi við typu- og rakstrargóðkenning av sótt-reinsingarskipanum
- Málsviðgerð og eftirlit í samband við góðkenning av alibrúkum hvat sjúkufyribyrging viðvíkur
- Sýnistøku í sambandi við eftirlitið
- Annað eftirlit við alivinnuni, sum kann hava við sær vanda fyri spjaðing av fiskasjúkum.
- Alt eftir umstøðunum, er starvið eisini ætlað at verða góðskuleiðari fyri okkara kanningarstovur.

**Faklig krøv:**
- Útbúgving sum kemiverkfrøðingur ella tilsvarandi, á minimum diplom-stigi (akademiverkfrøðingur ella hægri)
- Royndir við innaneftirlitsskipanum og góðskustýring
- Kunnleika og royndir við edv-skipanum sum stuðla uppundir eftirlits- og kanningarstovurarbeiðið
- Koyrikort til bil er eitt krav.

**Vit kunnu bjóða:**
- Fjølbroytt arbeiði, har uppgávurnar eru sera ymiskar
- Verða við í menningini av Fiska- og djórasjúkudeildini á stovninum
- Tú kemur nógv runt í landinum og í samband við nógv fólk innan alivinnuna
- Møguleikar fyri at menna teg í arbeiðnum, við skeiðsluttøku og aðrari eftirútbúgving.

**Annað:**
- Væntast skal, at áleið ein triðingur av arbeiðstíðini fer við eftirlitsvitjan-um á virkjum innan alivinnuna sum heild.
- Í sambandi við eftirlitsvitjanir skal roknast við, at arbeiðsdagarnir til tíðir kunnu gerast sera langir
- Møguliga góðskuleiðarastarvið fyri kanningarstovurnar er ætlað at verða ein minni partur av arbeiðstíðini í byrjanini, men kann økjast seinni, til at umfatað allan stovnin.

**Umsókn og setan:**
- Starvið skal setast skjótast gjørligt.
- Umsókn við avritum av prógvi, eftirútbúgving, starvsroyndum og møgu-ligum viðmælum skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi ónsdagin 30 mars 2005.
- Lønin verður sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjar-málaráðið, sí www.lnd.fo.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Peter S. Østergaard, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Kunngerð um summarferiu 2005

Byggivinnan heldur summerferiu vikurnar 30, 31 og 32, tað er frá mánadegi 25. juli til leygardagin 13. august.

**Vinnuhúsið *og fyritøkurnar:***

| | |
|---|---|
| *P/F Articon* | *P/F Atlanticpane* |
| *P/F BVS* | *P/F Byggitek* |
| *Sp/f Búsetur* | *P/F Demich* |
| *P/F Elmek* | *P/F Einar Mikkelsen* |
| *Sp/f El & Tele* | *P/F Føroya Gruggi* |
| *P/F Føroya Termovirki* | *P/F Guttesen og Staksberg* |
| *Sp/f Haldur Vang* | *Sp/f Hans Dam* |
| *J & K Betong* | *P/F J & K Petersen* |
| *P/F Løvubetong* | *P/F Vatnsoyrar Snikkaravirki* |
| *P/F Zacharias Leitisstein* | |

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 309900 • Fax +298 309901 • E-mail: industry@industry.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tekniska deild**

heldur til í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanardeildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

Tekniska deild umsitur millum annað allar kommunalar vegir, og ferðsluviðurskiftini á kommunalu vegunum.

Tekniska deild umsitur eisini: vatnverkið, gøtuljós, heilsu- og umhvørvismál, kloakkir o.m.a.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Starvsfólk til Teknisku deild

Á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum fólki at arbeiða við digitalari kortgerð í sambandi við skráseting av leiðingum o.ø.

**Starvið**
Fevnir umframt skráseting av adressum, kloakk-, vatn- og gøtuljósleiðingum, byggisamtyktum í kommunala partinum av GIS-samstarvinum innan FDS- skipanina, eisini um frálæru/support til aðrar deildir hjá kommununi.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at tú hevur útbúgving sum tekniskur assistentur ella líknandi. Alt skrásetingararbeiðið verður gjørt við Microstation GeoGraphics, og er tað umráðandi at tú hevur kunnleika til hesi forrit. Harumframt er tað ein fyrimunur at tú hevur kunnleika til forritini í Microsoft Office pakkanum.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert fyrikomandi og nærløgd/-lagdur og kann samstarva við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunal Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi lagi týsdagin 29. mars 2005. Viðmerk á umsóknina "Starvsfólk til FDS á teknisku deild"

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!